# Stuðulspolitikkur hjá Fuglafjarðar kommunu

Samtyktur í Mentamálanevndini 11. mars 2008 og av býráðnum 24. apríl 2008

## Kapitul I
## Endamál

§ 1. Stuðulspolitikkurin er ætlaður sum hjálp til Mentamálanevnd í viðgerð av umsóknum og møguliga sum grundgeving í svari til umsøkjarar. Endamálið við stuðulspolitikkinum er soleiðis trífalt:

1. At lýsa hvørjum stuðul verður latin til;
2. at greiða frá, hvussu stuðlað verður;
3. at greiða frá, hvør tekur avgerð um at stuðla.

## Kapitul 2
## Hvørjum stuðul verður latin til

§ 2. Stuðul kann verða latin til niðanfyri standandi virksemi hjá fólki búsitandi í kommununi:

1. Ítrótt,
2. sang og tónleik,
3. sjónleik í breiðari merking,
4. myndlist og skapandi list í breiðari merking íroknað heimavirki og gomul handverk,
5. áhugafeløg og trúðarbólkar,
6. bóka- og fløguútgávur,
7. blaðútgávur,
8. uttanlandsferðir hjá skúlaflokkum frá 1. flokki upp til og við hægri lesnað.

## Kapitul 3
## Ítróttarvirksemi

§ 3. Á hvørjum ári verður ein upphædd latin ítróttarvirkseminum í kommununi. Hendan upphæddin verður av Mentamálanevndini býtt millum tær ítróttargreinir, sum virknar eru.
§ 4. Er talan um serligan tørv, eitt nú óvanligt ella á annan hátt stórt keyp av útgerð, kann stuðul umframt útgangsupphæddina verða latin.
§ 5. Verður skipað fyri tiltøkum, kappingum, ítróttar-, summar- ella líknandi stevnum, kann stuðul umframt útgangsupphæddina verða latin.

§ 6. Verða skráir, kalendarar ella prentað tilfarð annars gjørt, kann lýsingarpláss verða keypt fyri vanligan prís.

## Kapitul 4
## Sangur og tónleikur

§ 7. Sangarar, tónleikarar og onnur, ið varða av, kunnu søkja um stul til konsertir, framførslur, verkætlanir, vitjanir, skeiðsvirksemi og líknandi, sum verður hildið í ella uttanfyri Fuglafjarðar kommunu.
§ 8. Verða skráir, kalendarar ella prentað tilfarð annars gjørt í sambandi við tiltøk, kann lýsingarpláss verða keypt fyri vanligan prís.
§ 9. Í sambandi við útgávur, sí kap. 8

## Kapitul 5
## Sjónleikur

§ 10. Sjónleikarar og onnur, ið varða av, kunnu søkja um stuðul til framførslur, verkætlanir, vitjanir, skeiðsvirksemi og líknandi, sum verður hildið í ella uttanfyri Fuglafjarðar kommunu.
§ 11. Verða skráir, kalendarar ella prentað tilfarð annars gjørt í sambandi við tiltøk, kann lýsingarpláss verða keypt fyri vanligan prís.

## Kapitul 6
## Myndlist og skapandi list í breiðari merking íroknað heimavirki og gomul handverk

§ 12. Listafólk kunnu søkja um stul til verkætlanir, framsýningar, vitjanir, skeiðsvirksemi og líknandi, sum verður hildið í ella uttanfyri Fuglafjarðar kommunu.

§ 13. Verða skráir, kalendarar ella prentað tilfarð annars gjørt í sambandi við tiltøk, kann lýsingarpláss verða keypt fyri vanligan prís.

## Kapitul 7
## Áhugafeløg og trúðarbólkar

§ 14. Stuðul kann verða latin áhugafeløgum og trúðarbólkum, sum eru heimahoyrandi í Fuglafjarðar kommunu.
§ 15. Verða skráir, kalendarar ella prentað tilfarð annars gjørt í sambandi við tiltøk, kann lýsingarpláss verða keypt fyri vanligan prís.

## Kapitul 8
## Bóka- og fløguútgávur

§ 16. Er talan um útgávu, sum er gjørd av fólki í kommununi, kunnu annaðhvørt verða keypt 10 eintøk ella latnar kr. 1.500. Kommunan kann eisini velja at lata stuðul til fløguútgávur uttanfyri kommununa, um útgávan stuðlar góðum endamáli.
§ 17. Er talan um størri verk kunnu færri eintøk verða keypt, men stuðlar útgávan góðum endamáli, kann hinvegin størri stuðul verða latin.

## Kapitul 9
## Blaðútgávur og talgildar útgávur, portalar og heimasíður

§ 18. Er talan um serstaka útgávu, sum verður givin út í kommununi, kunnu annaðhvørt verða keypt 10 eintøk ella latnar kr. 1.500.
§ 19. Er talan um útgávu, sum eftir ætlan skal koma út regluliga, kann kommunan lata regluligan stuðul og keypa 1 eintak.
§ 20. Er møguleiki at tekna hald, kann kommunan, umframt møguligan stuðul, tekna hald fyri 1 eintak fyri vanligt haldaragjald.
§ 21. Er møguleiki fyri at lýsa, kann kommunan lýsa fyri vanligan lýsingarprís umframt tað, sum nevnt er í § 20.
§ 22. Er talan um talgilt blað, kann hald umfram lýsingarpláss verða keypt fyri vanligan prís.
§ 23. Fyri portal ella heimasíðu, sum er heimahoyrandi í kommununi og verður mettur at hava serligt virði fyri allan býin, kann stuðul verða latin áljóðandi kr. 1.500 árliga umframt møguligt keyp av lýsingarplássi fyri vanligan prís.

## Kapitul 10
## Uttanlandsferðir hjá skúlaflokkum ella einstaklingum

§ 24. Fyri hvønn næming frá 1. til 10. flokk, sum er búsitandi í kommununi, kann stuðul áljóðandi kr. 500 verða latin í sambandi við uttanlandsferð. Hvør næmingur kann tó í mesta lagi fáa hendan stuðul 3 ferðir hesi 10 árini.
§ 24. Fyri hvønn næming í miðnámsflokkum ella lesandi á hægri lærustovni, sum er búsitandi í kommununi, kann ein upphædd áljóðandi kr. 1.000 verða latin í sambandi við uttanlandsferð. Hesin stuðul er ikki at samanbera við ferðastuðul frá landinum.
§ 26. Stuðul verður ikki latin einstaklingum, sum skulu uttanlands í skúlaørindum, hetta uttan mun til um talan er um útbúgving, há- ella eftirskúlar ella ítróttarskúlar. Undantikin er kortini tey, sum koma undir §§ 7 og 10.

## Kapitul 11
## Mannagongdir

§ 27. Allar umsóknir skulu móttakast skrivliga og skulu fáa skrivligt svar.
§ 28. Allar umsóknir verða avgreiddar av Mentamálanevndini uttan niðanfyri standandi, sum verða avgreiddar av skrivara Mentamálanevndarinnar:

1. §§ 6, 8, 11, 13 og 15.
2. Kap. 8 (skrivarin kann kortini velja at leggja málið fyri Mentamálanevndina).
3. Kap. 9 (skrivarin kann kortini velja velja at leggja málið fyri Mentamálanevndina).
4. Kap. 10